**Umsóknarfreistin: 15. mars**

**Upptøkukrav:**

Lokið fráfaringarroynd fólkaskúlans (9.flokk) við nóg góðum úrsliti. Umsøkjarar verða bodnir til samrøðu áðrenn endaliga upptøku.

**Umsókn:**

Søkjast skal eftir áseting frá Mentamálaráðnum. Meiri kunning um hetta sæst á heimasíðuni hjá skúlanum, www.tsk.fo.




**Tekniski Skúlin í Klaksvík**

Postboks 20
Heygavegi 1A
710 Klaksvík
Faroe Islands

Tlf. int.+ 298 45 63 1
Fax. int.+ 298 45 73 11
E-mail: tsk@tsk.fo


**Tekniski Skúlin í Klaksvík**

**Gastronom- og Føðsluhjálpari**

# Matvøruútbúgving



**Telefon nr. 456311**
**www.tsk.fo**

# Matvøruútbúgvingin: Gastronom– og Føðsluhjálpari

## Bygnaður

Fyrsti parturin av útbúgvingin tekur 20 vikur og er eitt Grundskeið.

Eftir Grundskeiðið velur næmingurin um hann ynskir at halda fram sum Gastronomhjálpari ella Føðsluhjálpari. Tá valið er tikið byrjar 2.skúlakseið. Tá fer næmingurin í starvsvenjing í 10 vikur og síðan í skúla aftur á Tekninska Skúla í Klaksvík í 10 vikur, sum



endar við eftirmeting..

Eftir 2.skúlaskeið, er møguligt at fáa sær lærupláss, her ið næmingurin er í læru í 36 vikur fyri síðan at koma inn í skúla í tvær vikur fyri at taka eina endapróvtøku sum Gastronomhjálpari ella Føðsluhjálpari



## Gastronomi (Kokkur)

Eftir at hava tikið prógv sum Gastronomhjálpari, er møguligt at útbúgva seg víðari til Gastronom. Hetta krevur ein lærusáttmála við góðkendan lærupláss. Ein stórur partur av arbeiðinum hjá einum gastronomi snýr seg um at seta máltið saman, so at tann vitjandi fær eina góða



uppliving. Eisini lærir ein millum annað um matvørugóðsku, kundatænastu, borðreiðing og reinføri

## Føðsluatstøði (Ernærringsassistent)

Velur næmingurin at útbúgva seg á Tekniska Skúla í Klaksvík sum Føðsluhjálpari, er møguleiki at útbúgva seg víðari til Føðsluatstøðara við at gera ein lærusáttmála við góðkent lærupláss. Sum Føðsluatstøðari arbeiðir ein við at seta saman serkost til fólk við ymiksu sjúkum, eldri, ítóttarfólk, børn og ung. Á skúlanum lærur tú millum annað um føðslu- og kostlæru, heilsu og reinføri.

## Mannagongdin á Grundskeiðinum

Grundskeiðið er 20 vikur.
Næmingatalið er 24, har ið tað verður deilt upp í tveir flokkar. Meðan annar flokkurin er í køkinum og arbeiðir verkligt, er hin flokkur í skúlastovu og arbeiðir ástøðiligt.

Almennu lærugreinarnar eru Føroyskt og Støddfrøði á E-stigi.

Tær ástøðiligu lærugreinarnar eru millum annað heilsulæra, vøtukunnleiki, kostfrøði, føðslufrøði, reinføri, søla og tænasta.

Grundskeiðið endar við próvtøkum og eftirmetingum

**Tekniski Skúlin í Klaksvík**

Postboks 20
Heygavegur 1A
FO-710 Klaksvík
Telefon nr. +298 456311
Telefax nr. +298 457311

E-mail: tsk@tsk.fo